***Helgi Abrahamsen***
***landsstýrismaður***

***Svar***

***upp á***

***Fyrispurning nr. 73/2019 frá Aksel V. Johannesen, løgtingsmanni, viðvíkjandi endurgjaldi til fyritøkur og feløg, settur landsstýrismanninum í vinnu- og umhvørvismálum Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)***

**Spurningur**

1) Hvussu ber tað til, at vegleiðingin hjá Umhvørvis- og vinnumáláráðnum ísv. endurgjald til fyritøkur, orsakað av korona, sigur, at tað verður ikki latin stuðul minni enn 6.000 kr. um mánaðin, tá Løgtingið samtykti broytingaruppskotið um at strika minstamarkið?
2) Er tað rætt skilt, at landsstýrismaðurin metir, at áhugafeløg við v-tali, sum hava mist ella koma at missa munandi inntøkur, ikki hava rætt til endurgjald eftir hjálparpakka 2?

**Svar:**

***Til nr. 1***

Á heimsíðuni hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum hevur ikki verið vegleiðing um løgtingslóg um stuðulsskipan til fyritøkur til fastar útreiðslur orsakað av COVID-19. Á heimsíðuni varð kunnað um innihaldið uppskotinum, sum varð latið Løgtinginum, løgtingsmál nr. 135/2019, m.a. um minstamarkið upp á 6.000 kr. Tað varð sum kunnugt strikað undir viðgerðini í Løtinginginum. Kunningin á heimusíðu Umhvørvis- og vinnumálaráðsins, sum ikki varð rættað samsvarandi beinanvegin, er seinni rættað.

,

***Til nr. 2***

Løgtingslóg um stuðulsskipan til fyritøkur til fastar útreiðslur orsakað av COVID-19 heimilar landsstýrismanninum at seta nærri reglur um stuðulskipanina. Nærri reglur verða ásettar í kunngerð um stuðulskipanina, sum verður sett í gildi fyrsta dagin.

Endamálið við stuðulslógini er m.a. at forða fyri stórum húsagangi í vinnuni við tí avleiðing, at størv í vinnuni í stórum tali hvørva. Eftir kunngerðini verða feløg, grunnar o.a. við almannagagnligum ella góðgerandi endamáli tí ikki fevnd av stuðulsskipanini.

Í kunngerðini verður ein fyritøka allýst sum

a) Ein likamligur persónur, sum fyri egna rokning rekur vinnuligt virksemi, t.e. sjálvstøðugt vinnurekandi  ella einstaklingafyritøka, ella
b) ein løgfrøðiligur persónur, undir hesum parta- og smápartafelag, íognarfelag, kommandittfelag, lutafelag, og aðrar fyritøkur við avmarkaðari ábyrgd ella deild undir útlendskum løgfrøðiligum persóni, sum rekur vinnuligt virksemi í Føroyum.

Vinnuligt virksemi verður í kunngerðini allýst soleiðis:
Søla av vørum ella immateriellum rættindum, tænastuveitingum o.l., sum fyritøkan vanliga móttekur viðurlag fyri ella sølu ella útleigan av fastogn, og har fyritøkan hevur sum endamál at fremja fíggjarligu áhugamálini hjá eigaranum av fyritøkuni, eigarunum av ella luttakarunum í felagnum ella fíggjarligu áhugamálini hjá grunninum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 6. mai 2020

**Helgi Abrahamsen**
landsstýrismaður